ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

# Brekpolitiskar grundreglur

**"Vit eru øll evnarík,  munurin er bara, hvussu vit gagnnýta tær gávur, sum okkum eru givnar."**

**Stevie Wonder**

Føroyar tóku í 2009 undir við sáttmálanum fyri einstaklingar, ið bera brek. Eg meti tað vera gagnligt fyri framhaldandi at menna brekpolitikkin her á landi, at vit kenna tær súlur, ið breksáttmálin byggir á.

Hóast vit hava tikið undir við breksáttmálanum, so røkka rættindini hjá hvørjum einstøkum ikki longur enn tær skyldur, ið vit sum samfelag og sum einstaklingar hava at tryggja okkara borgarum hesi rættindi. Breksáttmálin er tó fyrsta stigið á leiðini, og er yvirskipaða grundarlagið undir eini menning av økinum, undir hesum at dagføra lógargrundarlagið og sum heild at menna økið - eisini innan verandi skipan og lógarkarmar.

Verandi forsorgarlóg er upprunaliga frá sekstiárunum, og er ein samanskriving av ymiskum lógarásetingum og -broytingum. Eingin ivi er um, at okkum tørvar nýggja lóggávu og dagførdar reglur annars innan økið, men sjálvt um verandi forsorgarlóg ikki er nýggj og byggir á ein hugburð, sum við tíðini er munandi broyttur - eisini her í Føroyum, so avmarkar lógin okkum ikki í at líta frameftir og at seta orð á tær grundreglur, sum mynda okkara hugburð og tað arbeiðið, ið liggur fyri framman. Tað er givið, at við ella uttan nýggjari lóggávu, so er pláss til broytingar og nýhugsanir innan brekøkið. Rættindi sambært lóg verða ikki meira livandi enn tann skipan, ið hesi rættindi virka í.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

At orða eitt felags yvirskipað grundarlag er fyrsta stigið at føra tann brekpolitiska hugburð, ið vit við breksáttmálanum hava tikið undir við, út í verki, nevniliga at fólk, ið bera brek, skulu njóta somu rættindi og skyldur sum onnur.

Annika Olsen
landsstýriskvinna í almannamálum

**Brekhugtakið**

Brekhugtakið er ikki eitt eintýtt fast hugtak. Oftast verða fólk við breki allýst sum fólk við likamligum, sálarligum ella andligum virkistarni, og sum hava tørv á kompensjasjón fyri at kunna virka á jøvnum føti við onnur.

Brekhugtakið er ikki siðfast og flytir seg alsamt í mun til gongdina í samfelagnum annars. Brekhugtakið hevur flutt seg frá at vera eitt meira læknafrøðiligt hugtak, har fólk við breki høvdu ein feil ella eina sjúku, ið skuldi sjúkugreinast og møguliga lekjast, til meira at fevna um, at samfelagið og umhvørvið annars skal rúma fólki við breki. Hugburðurin er broyttur í samsvari við gongdina at sameina fólk við breki í samfelagið. Skulu fólk, ið bera brek, sameinast, má samfelagið broytast og laga seg til tørvin hjá tí einstaka.

Sama gongd sæst eisini aftur í altjóða høpi. ST viðtók í 1993 fyrimyndarreglurnar um at útvega javnlíkar møguleikar fyri fólk, ið bera brek. Sambært fyrimyndarreglunum merkir nýggja brekhugtakið: “at hava mist ella at hava avmarkaðar møguleikar til at virka í samfelagslívinum á jøvnum føti við onnur.” Hugtakið lýsir sambandið millum tann einstaka, ið er tarnaður, og umhvørvið. Endamálið við hesum brekhugtakinum er at leggja dent á avmarkingarnar í umhvørvinum og í tí skipaða virkseminum í samfelagnum, sum t.d. upplýsing, samskifti og útbúgving, og sum forðar fólki, ið bera brek, í at taka lut á jøvnum føti við onnur.

**Henda** allýsingin av brekhugtakinum er umráðandi, tí hon lýsir neyvt munin millum lyklahugtøkini “brek” og “virkistarn”. Virkistarn er tað, sum kann staðfestast hjá viðkomandi, ið ber brek, t.d. vánalig/manglandi -sjón -hoyrn ella sálarligt ella menningarligt virkistarn. Brek er tað, sum er millum persónin, ið ber brek, og umhvørvið - tað er ikki eitt brek við sjálvum persóninum, men heldur eitt brek í kringumstøðunum. Brek er sostatt ein avmarking í virkisførinum, sum kemst av virkistarninum, við tað at samfelagið ikki er innrættað til at samsvara tørv og krøv hjá fólki við virkistarni.

Brekpolitikkur fevnir tí í minni mun um sjúkugreining og viðgerð, men meira um kompensasjón og at broyta kringumstøðurnar, soleiðis at borgarar, ið hava virkistarn, kunnu taka lut á jøvnum føti við onnur.

Tað er í hesum anda, at grundreglan um atkomu tey seinastu árini hevur fingið ein so týðandi brekpolitiskan leiklut.

Hugtakið um atkomu hevur ment seg í samsvari við, at vit eru vorðin meira tilvitað um, hvussu (lítið) hóskandi samfelagið er fyri tey, ið bera brek. Frá at vera eitt hugtak, sum bert fevndi um atkomuviðurskifti til bygningar, fevnir hugtakið nú breiðari. Atkoma lýsir ta fjølbroyttu og samansettu tilgongdina, sum er neyðug fyri at laga seg eftir og leggja til rættis samfelagsliga virksemið til eisini at fevna um tørvin hjá fólki, ið hava virkistarn, hetta uttan mun til hvørt virkistarnið er kropsligt, sálarligt ella andligt.

**Grundreglan um kompensasjón**

Vit gerast alsamt meira tilvitað um, at hvør einstakur persónur hevur rætt til sín egna samleika – at vera eitt menniskja, ið hevur eitt virkistarn – heldur enn at vera sjúklingur, ið hevur eina sjúku.

Í tann mun, virkistarnið skyldast sjúku, skal sjúkan viðgerast. Men í tann mun, virkistarnið er ein støða, skal dentur leggjast á loysnir, ið taka støði í umstøðunum hjá tí einstaka.

Grundreglan um kompensasjón ber við sær, at samfelagið bjóðar fólki, ið hava virkistarn, tænastur og veitingar, sum hava til endamáls at hjálpa upp á ella avmarka avleiðingarnar av virkistarninum.

Kompensasjón skal – í tann mun til ber – forða og fyribyrgja støðum, ið avmarka virkismøguleikar hjá fólki, sum hava virkistarn.

Kompensasjón er ein grundleggjandi liður í royndini at veita fólki, ið bera brek, javnlíkar møguleikar. Kompensasjón er hvørki framíhjárættindi ella sersømdir, men er heldur ein roynd at javna eitt ólíkað útgangsstøði.

Grundreglan um kompensasjón skal skiljast sum ein brúgv millum tær avmarkingar, ið skyldast virkistarnið, og tey samfelagsligu krøv og vánir, ið verða stillað hvørjum einstakum.

- Kompensasjón kann vera einstaklinga veitingar, sum t.d. koyristólur, tulkatænasta ella stuðulsfólk.

- Kompensasjón kann veitast sum javnsett tilboð, t.d. at skriftligt tilfar og pjesur verða veittar sum ljóðbond, ella at serstøk koyriskipan verður boðin teimum, ið ikki kunnu nýta almenna ferðasambandið.
- Kompensasjón kann somuleiðis veitast sum felags tiltøk, t.d. við at samfelagið verður innrættað til at rúma fólki, ið hava virkistarn.

Tá ið talan er um stuðul til ymiskar útreiðslur, so er grundreglan um kompensasjón bert viðkomandi fyri tær meirútreiðslur, ið standast av virkistarninum, og er ikki viðkomandi fyri tær útreiðslur, sum viðkomandi persónur annars vildi havt.

Grundreglan um kompensasjón og grundreglan um sektorábyrgd eru kjarnin í royndini at útvega javnlíkar møguleikar fyri fólk, ið bera brek.

**Grundreglan um sektorábyrgd**

Borgarar, ið bera brek, eru á jøvnum føti við allar aðrar borgarar í okkara samfelag, og eru tískil fevndir av somu rættindum og somu skyldum sum onnur.

Skulu borgarar, ið bera brek, fáa gagn av rættindum og liva upp til sínar skyldur, má alt samfelagið taka atlit til, at nakrir av landsins borgarum hava avmarkað virkisføri og tillagað sínar tænastur eftir hesum.

Grundreglan um sektorábyrgd merkir: at hvør myndugleiki, felagsskapur ella virki, ið hevur ábyrgd av at veita eina ávísa almenna tænastu ella veiting, hevur ábyrgd at **tryggja** og **fíggja**, at somu tænastur ella veitingar, verða veittar til borgarar, ið hava virkistarn.

Meginreglan um sektorábyrgd hevur stóran týdning í mun til, at allir borgarar skulu hava somu viðferð, og at allir borgarar hava sama virði. Borgarar, ið hava virkistarn, skulu ikki noyðast í serligar fyriskipanir/tænastur, tí at almennu tænasturnar ikki eru atkomuligar. Grundreglan um sektorábyrgd er tengd at grundregluni um kompenasjón í tann mun, at tað er grundreglan um sektorábyrgd, ið regulerar, hvørs ábyrgd tað er at veita kompensasjón.

Grundreglan um sektorábyrgd er ikki eitt siðfast løgfrøðiligt hugtak, og er heldur ikki ásett við lóg. Grundreglan sæst tó meira og meira aftur í ymiskari lóggávu

t.d. í fólkaskúlalógini – "Skúlin fyri øll". Ein partur av sektorábyrgdini fevnir eisini um at halda tær útreiðslur, ið standast av sektorábyrgdini, og tí skal ein veitari ikki hava endurgjald frá øðrum myndugleika fyri útreiðslur, ið standast av at veita tænastur til borgarar, ið bera brek.

Grundreglan um sektorábyrgd er einasta amboðið, sum kann nýtast at røkka endamálinum um javnrættindi. Ábyrgdin at føra og fíggja brekpolitikk kann ikki leggjast á bert tann eina myndugleikan. Sami myndugleiki hevur ikki ábyrgd ella avgerðarrætt innan øll øki. Grundreglan um sektorábyrgd er tískil eitt eins og dynamiskt og smidligt amboð, sum tann veruleiki vit liva í.

### Grundreglan um samhaldsfesti

Stuðul og fyriskipanir, hvørs endamál er at bøta um brekið, verða fíggjað yvir skattaskipanina. Stuðul og fyriskipanir verða sum høvuðsregla veitt ókeypis til tann einstaka, og eru tí ikki tengd at inntøku og ogn.

Grundreglan um samhaldsfesti er ikki bert ein brekpolitisk grundregla, men er ein almenn vælferðarpolitisk grundregla. Grundreglan um samhaldsfesti verður tó tikin við, tí henda grundreglan heldur fast um meginregluna um kompensasjón sum ein fyriskipan um javnlíkar møguleikar - og ikki sum ein tørvsmett fyriskipan. Uttan mun til, um tann, ið ber brek, er ríkur ella fátækur, so tørvar viðkomandi kompensasjón fyri at hava sama útgangsstøði sum onnur.

### Grundreglan um javnviðgerð

Grundreglan um javnviðgerð er ein liður í grundreglunum um javnrættindi og javnstøðu, sum í 1993 varð staðfest við ST-fyrimyndarreglunum um javnlíkar møguleikar fyri fólk, ið bera brek. Endamálið við fyrimyndarreglunum var at áseta nøkur altjóða viðurkend stevnumið, sum skuldu tryggja rættindi teirra, ið bera brek. Sáttmálin um rættindi teirra, ið bera brek, sum í 2009 varð settur í gildi fyri Føroyar, byggir á somu grundreglur sum fyrimyndarreglurnar.

Javnviðgerð merkir *ikki*, at øll skulu viðgerast eins. Javnviðgerð merkir, at øll skulu hava somu møguleikar – somu møguleikar at menna og gagnnýta førleikar og hegni. Javnviðgerð merkir ofta at gera mannamun, við tað, at tann, ið ber

brek, hevur aðrar fortreytir enn ein, ið ikki ber brek. Eisini hava borgarar, ið bera brek, sínámillum sera ymiskar fortreytir.

Tað er umráðandi júst at skilja, at fortreytirnar hjá teimum einstøku, ið bera brek, kunnu vera sera ymiskar. Hugtakið "javnviðgerð" má tí eisini endurspegla munin á t.d. tí at vera blindur og tí at vera fjølbrekaður.

Hugtakið "javnviðgerð" skal fevna um øll virkistarn, og fyri at hugtakið skal kunna rúma øllum, kann hugtakið ikki bert allýsast út frá mekaniskum hugtøkum, men heldur út frá moralskum hugtøkum um "lívsgóðsku" og "tí góða lívinum[i]". Í tann mun vit ikki kunnu veita trygd fyri somu møguleikum, so eiga vit altíð at kunna veita trygd fyri "tí góða lívinum".

[i] "Tað góða lívið" er eitt subjektivt filosofiskt hugtak, sum ikki er eintýðugt, og sum í filosofiini hevur verið umrøtt líka síðan Platon og Aristoteles.